## DAGSINS MEINING

# Valdu sjálvstýri og vinstravongin!

Tað er einki at ivast í, at grønlendingar valdu sjálvstýri á landstingsvalinum týsdagin, eins og teir valdu flokkarnar vinstrumegin miðjuna. Sjálvstýrisrákið er eisini komið til Grønland, og tað er væl skiljandi, tá hugsað verður um, at í eini hvørji tjóð liggur ynski um at standa á egnum beinum, politiskt og búskaparliga.

Hóast grønlendska samfelagið í dag fullkomiliga hvílir á donsku ríkisveitingini, so er ikki løgið, at tað millum grønlendingar er eitt ávíst agg til Danmark og danir:

- Danska stjórnin gjørdi eina sonevnda verjuavtalu vid USA um støðina í Thule, sum m.a. bar í sær, at fleiri hundrað grønlendingar vórðu tvangsfluttir til annað stað.

- Danski forsætisráðharrin gav USA loyvi at goyma kjarnorkuvápn í Thule, og tá vanlukkan hendi í 1968, fingu grønlendingar lítið at vita. Og alt eftirspælið er mannminkandi.

- Tá ungir politiskt tilvitandi grønlendingar sum Moses Olsen, Joanthan Motzfeldt og Lars Emil Johansen fóru at virka fyri grønlendskum heimastýri yptu danir øksl og vóru trekir at byrja við.

- Og nú, tá grønlendingar vilja hava verjuavtalauna frá 1951 endurskoðaða, eru teir stóru flokkarnir í Danmark ímóti tí, men í hesum eru grønlendingar samdir – avtalan skal endurskoðast.

Hesir søguligu og aktuellu veruleikar byggja eisini upp undir eitt sjálvstýrisynski. Men tað tykist, sum at grønlendsku flokkarnir ásanna, at landið kann ikki taka sjálvstýri eftir fáum árum, og tí hava teir sett sum mál at fyrireika landið til sjálvstýri ella økt sjálvstýri, m.a. við at byggja upp ein sjálvberandi búskap.

Eins og í Føroyum er langt millum tjóðveldisflokkin, Inuit Ataqatigiit, sum mælir til fullveldi og vil hava fullveldisspurningin avgreiddan fólkarrættarliga sambært lýsing ST, og til sambandsflokkin Attasut. Men Inuit Ataqatigiit er so mikið frægur, at hann heldur, at hann kann taka stig tann á sjálvstýrisleið saman vid Attasut, hóast tað má haldast at vera eitt møðismikið tak.

Orsøkin til hetta er tó hon, at agg er millum javnaðarflokkin Siumut og Inuit Ataqatigiit frá tí, at landsstýrissamstarvið slitnadi ífjør, tá ósemja var um høgu lønarhækkingina hjá politikkarunum, og kann forða fyri einum natúrligum samstarvi millum hesar sjálvstýrisflokkarnar til vinstru.

Men Siumut er framvegis størsti flokkur, hóast hann gekk aftur, og tað er hann, sum í fyrstu atløgu skal skipa fyri samráðingunum og kann velja, hvønn hann fyrst og fremst vil arbeiða saman vid – tí borgarliga sambandsflokkinum Attasut ella vinstrasinnaða Inuit Ataqatigiit.

Hóast spurningurin um eina sjálvstýristilgongd stendur varliga á politisku skránni, hevur komandi landsstýri nógvar trupulleikar at loysa: sosialu trupulleikanir eru nógvir, útbúgvingarstøðið er lágt, nógv rávøra fer av landinum til virkingar í Danmark, stóru heimastýrisfyritøkurnar skulu kanska einskiljast, landið kostar nógv at reka vid spjaddum býum og bygdum o.s.fr.

Men vónandi fær Grønland eitt vælvirkandi landsstýri, sum kann savna alt fólkið í eini skynsamari sjálvstýristilgongd, og byggja upp ein sjálvberandi búskap, so grønlendingar sum frálíður sleppa av við stuðulsbúskapin, sum avlagar og forðar eini natúrligari samfelagsmenning.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hergeir Nielsen skeivt avmarsjeraður – enn einaferð

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



Tað undrar undirritaða ikki sørt at síggja grein hjá Hergeiri Nielsen við yvirskrivtini ,»Johan Dahl villleiðir almenningin« í onsdagsdimmuni.

Undirritaði hevur ongantíð sagt, at eg ikki havi fingið avrit av skrivinum frá verjumálaráðharranum, - tað havi eg fingið , eisini komu fundarboð frá formanninum umvegis skrivaran út móti midnátt, at fundur skuldi verða um nevnda mál morgunin eftir .

Eisini bleiv eg spurdur, um tað var í lagið, at frávik mátti gerast í tíðarfreistini, tí fundurin var umráðandi, og hesum játtaði eg , eins og eisini bleiv játtað at verða við til nevnda fund.

Hesin bleiv so seinni sama kvøld avlýstur og seinni hildin í løgtinginum aftaná løgtingsfundin tann 20.11.02

Tað skriv sum eg vísti til í samrøðu míni við útvarpið og segði, var ókent fyri meg inntil fundin í løgtingshúsinum, - var tað skriv, sum Hergeir Nielsen seinni hevur sent til løgmann, har hann sum formaður í uttanlandsnevndini og sigandi umboðandi ein meirluta í nevndini gjørdi greitt í skrivi til løgmann, at meirilutin mælir løgmanni til beinanvegin at svara verjumálaráðharranum, at hann ikki skilir skriv verjumálaráðharrans sum eina kunning samsvarandi ásetingunum í heimastýrislógini.

Millum annað verður síðani í skrivinum sagt at: Sostatt verður eingin tilsøgn innan fyri omanfyri nevndu øki givin føroyum viðvíkjandi.

Sum greitt frá í útvarpinum so var skrivið til uttanlandsnevndina eitt skriv til KUNNINGAR og ikki eitt skriv, har biðð var um nakra tilráðing, og tað kom eisini púra greitt fram á fundinum, har løgmaður var við í løgtinginum,- løgmaður bleiv beinleiðis spurdur um hetta, og svarið var, at hann einans kunnaði okkum og bað ikki um tilráðing.

Minnist meg rætt frá fundinum í løgtingshúsinum, so var Heðin Zachariassen ikki við uppá at senda skrivið, sum Hergeir hevði orðað til løgmans, men hann einans gekk við til at biðja løgmann taka av kunningar tilboðnum frá verjumálaráðharranum um víðari gongdina í málinum.

Hetta kann Heðin Zachariassen ivaleyst eisini vátta var so, sum eg sigi.

Sum ikki einaferð og ivaleyst heldur ikki seinastu ferð, so vil uttanlandsnevndarformaðurin hava konfrontasjón, tað dámar honum best, sær tað út til.

Spell, at øll onnur altíð misskilja hann, tað má verða møðsamt í longdini.

Nei, Hergeir Nielsen, Johan Dahl villleiðir ikki almenningin, men tað sær ikki mætari út enn, at onkur annar hevur tendensir tann vegin.

# Karmferðslan

**Ásmundur Gudjónsson**



Landsynningurin hevur ligið nokk so tráður allan novembermánað við vindi og regni. Er tað nakað sum vit føroyingar ikki orka fyri, so er tað júst regn og vindur, men sum plástur á sárið hava vit jú eina vælvirkandi og vælútbygda samferðlsu, sum syrgir fyri at ein kemur turrskøddur úr staði í annað. So tað skuldi staðið væl til!

Ein mánamorgun í november fóru eg og børnini úr Havnini út til Svínoyar. Veðrið var stak keðiligt. Nógvur vindur av landsynningi og regn. Bussurin fer eisini so ókristiliga tíðliga, at ein skal taka seg alvorliga saman til henda túr. Eftir ferðaætlanini fer bussurin kl 06.20 og so náa vit Dúgvuna kl 08.00 og Másan kl. 09.10 úr Hvannasundi.

Vit komu omna á farstøðina í rímiligari góðari tíð. Vit fóru tó út til bussin at standa, tí um ein stendur inni í farstøðini og er eitt sindur óansin, kann væl verða, at bussurin er farin, áðrenn tú varnast. Hetta vildi eg ikki skuldi henda. Stóð tí framman fyri bussin. Førarin er í bussinum, men vil ikki loyva okkum inn, tí enn er tíðin ikki komin. So vit noyðast at standa í regninum, tí at fara innum í farstøðina er ov risikabult. Umleið ein minutt áðrenn fráferð sluppu vit inn í bussin, men tá høvdu vit longu fingið hálvan karm.

Busstúrurin gekk sum hann plagar, hóast buksurnar føldust eitt sindur óbehagiligar av regninum. Hóast eg royndi, eydnaðist tað mær ikki at fáa blund í eyguni, men børnini deysaðu kortini. Vit komu til Leirvíkar 20 minuttir áðrenn Dúgvan skuldi fara. Spilt bíðitíð hugsaði eg, tað hevði ikki verið so galið at sloppi at sovi eitt sindur longur henda keðiliga mánamorgun. Men vit sluppu tó at sita í bussinum til klárt var at fara umborð.

So yvirum við Dúgvuni. Tað er torført at halda stýr á børnunum í øllum fólkabila-meldrinum á dekkinum. Eitt teirra hevði hug at renna avstað, men eg toygdi meg eftir tí, fekk fatur og togaði tað til viks, í tí ein bilur kemur framvið. Tað hevði nokk onki hent uttan tað, at klæðini hjá barninum vórðu dálkaði. Í tí eg tók í barnið kom eg at traðka í eitt ella annað - eina ILA vatnaskræpu ella líknandi. Tað luktaði í øllum førum virkuliga sjúkt. Tá vit sótu í kantinuni og hugnaðu okkum var einasti trupulleikin lukturin frá okkara skóm, tí ikki bert eg

*Framhald á síðu 13*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Gak ikki svangur, Høgni!

**Katrin Dahl Jakobsen**
*løgtingskvinna*



Eftir at hava lisið grein hjá Jóannesi Eidesgaard í mikudagsblaðnum um sjálvsstýrispolitikkin í Føroyum og viðmerking til hesa frá Høgna Hoydal, har hann spyr, um Jóannes hevur etið bláseym, eri eg sannførd um, at Høgni Hoydal hevur so ikki fingið bitan. Ikki inn í eygað!

Her er ein berur tómur magi sum rumblar á einum manni, sum hevur evni til at skrúva høvdið av og soleiðis kobla vit, skil og serliga sakligheit frá, og bara yvirliva av innantómum slagorðum, tá hann hevur ilt í sínum egna miseydnaða politikki. Tí viðmerkingin hjá Høgna má vera til alt annað enn áðurnevndu grein. Ein uppgerð við seg sjálvan kanska?

Tað var tann tíð, tá Høgni var umgyrdur í allar ættir av fjarstýrdum mailskipaðum *altíð-prefabrikeraðum-skriviklárum-grátifólki*. Tey eru virkin enn, fræ ttist. Men henda viðmerkingin avdúkar, at nú dugir maðurin, um ikki annað, so at gráta sjálvur. Tí hetta er tað bera grenj og knarr frá einum manni, sum ikki tolir at nakar finnist at, og helst kennir seg trokaðan av á sínum higartil privata norðuratlantiska vígvøll.

**Góða eydnu, grønlendingar.**
Høgni fær tað til, at Jóannes **ávarar** grønlendingar ímóti at velja frælsisleiðina. Ikki við mín besta vilja finni eg nakað brot í greinini hjá Jóannesi, har hann ávarar grønlendingar ímóti at velja hesa leið! Tvørturímóti ynskir hann grønlendingum, at tað skal ganga teimum betri enn okkum. At teir fara at duga betri, at fáa eina breiða undirtøku í fólkinum til broytingar. Tí uttan hana gerst lítið. At teir koma betri frá byrjan av, enn vit gjørdu. Sorry, Høgni, millum okkum sagt, er hetta innast inni ein ávaring ímóti tí illa umhugsaðu mannagongd, sum tú slóðaði fyri, hóast nøvn ikki eru nevnd. Soleiðis manst tú lesa tað og taka tað, eftirsum tín grenjari strax bleiv aktiveraður. Men so mikið breiðar herðar mást tú hava, at tú tolir atfinning og vónandi lærir av hesum álvarsama mistaki, sum eisini hevur verið beista dýr, heldur enn nú at seta teg at knarra. Øll onnur hava lært. Eisini veljarin. Úrslitið av tínum "uppleggi" millum "De Kontraherede Parter" varð jú, sum Jóannes eisini mótvegis grønlendingum ávarar ímóti, at Sambandsflokkurin gjørdist størsti flokkur. Har eru vit stødd í dag! Tað var títt ískoyti til sjálvsstýrispolitikk! Ein miðvís taðing av mótpartinum. Tí soleiðis virka tingini hjá okkum, tá so illa var avstað farið. Tí er rímiligt at spyrja um tit nakrantíð meintu nakað við øllum? Meintu tit veruliga at loysa eftir trimum árum, og halda fast við ríkisveitingina í minst fimtan ár, soleiðis sum tú upprunaliga kravdi? Meintu tit nakrantíð, at vit skuldu hava fólkaatkvøðu, tá tit so tóku hana frá okkum? Tú fert ikki framhaldandi at halda uppá, at tín leistur varð ein succes?

**Kom upp, Høgni!**
Greinin hjá Jóannesi hevur innast inni einki við landstingsvalgið at gera. Hvat er at øsa seg upp um. Jóannes starir seg ikki blindan á nakran vong ella flokk sum vinnara í hesum málinum, tekur tað ikki uppá tungu, soleiðis sum Høgni Hoydal so primitivt ger. Hann heldur ikki við nøkrum, sum var tað ein fótbóltsdystur. Høgni sigur, at Jóannes ávarar ímóti at velja loysingarflokkarnar. Tað stendur ongastaðni, og fer heldur eingin, sum virðir fólkaræði at gera. Júst her liggur munurin millum hesar báðar skribentarnar. Hetta at duga at kaga upp úr skotgrøvini og síggja heildina, sum er neyðug, skal nakað gott spyrjast burtur úr í so álvarsligum máli. At øll eru við frá byrjan av. Tað er boðskapurin! Føroyski loysingarleisturin hjá Høgna Hoydal hevði onga mótstøðu fingið í eini einaræðisskipan, har pallurin er tín og bara tín. Har tað ber til at látast, sum um okkurt slag av fólkaræði valdar, og har fólk eru farinat góðtaka, at tá stykkis kemur, sum t.d.við lovaðu fólkaatkvøðuni, so bara at siga- nei tvætl, vit tíma ikki allíkavæl.

Skuldi eg skoytt nakað upp í greinina hjá Jóannesi, so var tað, at líka mikið, hvør ger hvat í Grønlandi, so missið ikki solidaritetin úr eygsjón. Hevði henda hugsjón staðið fremst í allari tilgongd, ikki minst í møguligari sjálvsstýristilgongd, so var nógv vunnið. So hevði eingin dottið av vogninum. Høgni sløðir um seg og dálkar hetta ediliga hugtak við at brúka tað at sparktla við nú soleiðis eftir "behov" at fjala útyvir, at hann ikki fekk fólkið at standa saman um hansara privata eksperiment. So seint sum í gjár upplivdu vit tjóðveldskan solidaritet, tá hesi hildu hánt um uppskotið frá Javnaðarflokkinum at unna teimum arbeiðsleysu 80% úr ALS. Hvar var títt samhaldsfesti tá?

Vælsignaður, fær og fá tær okkurt. Um ikki annað so bláseym. Og finn tær so okkurt mál sum lógardeildin kann putlast við soleiðis framíhjá. Tað hevði sæð betri út. Tí okkurt skulu tómar hendur gera.

*Framhald av síðu 12*

hevði fingið skógvarnar vátar av rotnum fiskavatni.

Í Klaksvík var eisini nógvur vindur av landsynningi og regn. Har er tað so snilt, at menn hava tikið bussskýlið burtur. Men har stendur ein telefonboks, sum kan brúkast at kroka í. Eg lovaði børnunum inn í boksina og sjálvur mátti eg standa uttanfyri og kroka norðanvert boksina, men har lívdi ikki so gott, so eisini her fekk eg hálvan karm. Buksurnar vóru so dánt tornaðar eftir bíðitíðina í Havn, men nú skuldi eg so aftur standa til svars fyri landsynninginum. Jú forrestin, tað er eitt bíðirúm í Klaksvík, men her er støðan tann sama sum í Havnnini. Ert tú inni har og eitt vet óansin, kann lættliga henda, at bussurin er farin undan tær. Men hetta vildi eg ikki skuldi henda, so heldur ein hálvan karm afturat.

Busstúrurin gekk sum hann skuldi. Komin til Hvannasunds síggja vit, at tað er Súlan sum siglir, tí Másin er farin á beding. Ok við tí, Súlan siglir eitt sindur skjótari enn Másin, hóast hon rullar nógv verri. So leingi tað er landsynningur verður siglt yvir á Eiðið so tað bilar ikki so nógv við rullinum. Á bryggjuni fáa eg eitt hugnaligt prát við manningina um veður og vind. Í transithøllini, sum er ein bingja liggja fleiri postpakkar og ein sær, at talan er um seyðakrov. Jú, tey eru komin úr Svínoy fyrradagin og eru líkasum strandaði í binguni, tí flutningsfeløgini frásiga sær ábyrgdina fyri at flyta hesi krov til Klaksvíkar - orsakað av lukti sigst. Her koma bæði postverk, farmaleiðir og bygdaleiðir framvið, men krovini sleppa ongan veg. Spell at krovini ikki høvdu stert!

Tá alt er um at verða klárt og klokkan er um at verða siglingartíð, kemur ein ov sein farmaleið koyrandi omaneftir og skal lossa farm umborð. Hetta ger, at Súlan verður forsinkað við 20 minuttum.

Vit settu okkum so niðurundir og har neyt eg blíðskapin hjá manningini og fekk ein kop av kaffi. Fínar greyðir, hugsaði eg, umborð á Dúgvini kostar júst tað sama kaffi í plastik 8 krónur. Eg var eftirhondini vorðin eitt sindur kaldur av øllum hesum óbehagiligu og váttligu klæðunum, men royndi mítt besta at verða um børnini. Tað rullaði nokk so illa yvir um. Okkurt barnið fekk sjóverk og spýði.

Komin yvir á eið varð farið í land. Veðrið er framvegis tað sama, nógvur vindur av landsynningi og regn. Tað eru nærum tveir kilometrar frá lendingini til bygdina. Einasta flutningsfarið á farleiðini er ein lastbilur við krana. Bilførarnin tekur fegin fólk við so longi pláss er í stýrhúsinum, har passa eini tvey fólk, restin má so antin ganga ella upp í lastina, um ein tímir tað. Hetta man verða tann gloymda bygdaleiðin, tí onki stendur um hana í ferðaætlanini.

Veit væl, at eg nú havi valið millum pest og kolera. Valið stendur í millum at fáa tann absolutta karmin gangandi ella koyrandi. Hugsaði, at skal eg gjøgnumbloytast totalt, lat tað so bara ganga skjótt fyri seg, og valdi eg tí billoysnina. Børnini inn í førarahúsið og eg uppá lastina saman við viðførinum. Har var onki at gera enn at halda fast í kranan og stinga nøsina upp í landsynningin og tríva í sangin: Regn og regn og regn og regn, regnar allan dagin… og annars hugsa góðkennandi um filosofisku staðfestingarnar hjá Róa Pætursssyni um, at onkustaðni er tað heilt sikkurt ein alvorligur leki millum teori og praksis.

Tveir hálvar og ein megakarm fyri 130 krónur.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri hjálpsemi
og sýnda samkenslu tá kæra mamma,
vermamma, omma, langomma og systir okkara

**Emmily Nolsøe**

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Tøkk til sjúkrasystrar og læknar á B6
fyri tykkara stóru umsorgan og røkt.
Tøkk til heimasjúkrasystrarnar.
Tøkk tit øll, sum fylgdu henni og fyri blómur,
kransar, heilsanir og gávur til Zarepta.
Tøkk til talarar, sangkórið í Ebenezer, Karl Martin,
Dupultkvartettina og til øll, sum hjálptu til
við jarðarferðina og ervið.

*Fyri tey avvarðandi*
**Elsebeth, Heri og Regin**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu,
umsorgan og hjálpsemi, tá okkara elskaði
sonur og beiggi

**Terji Simonsen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum.
Ein serlig tøkk til heimarøktina og til tey,
ið vóru um hann til hann andaðist.
Tøkk til Bjarna Bæk, prest, fyri góð, vøkur
og troystarrík orð.
Tøkk til sangarar og gravarar.
Takk fyri blómur, kransar og fjarrit.
Tøkk til øll, ið fylgdu Terja
til hansara seinasta hvíldarstað.

**Maria, Atli og Høgni**

# Tøkk

Av hjarta takka vit øllum tykkum,
sum vístu samkenslu og umsorgan,
tá kæra mamma, vermamma, omma
og systir okkara

**Katrin á Dul Jacobsen**
Tórshavn

gjørdist sjúk og andaðist.

Takk til tykkum á B8, sum royndi tað tit kundu
at lætta og linna.
Takk til samkomuna í Ebenezer
fyri hjálpsemi og beinasemi.
Takk tit, sum hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Takk fyri heilsanir, kransar og blómur.
Takk, tit sum góvu Lindini eina peningagávu
og takk øll tit, sum fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað her.
Harrin signi tykkum øll.

*Familjunnar vegna*
**Dánial, Lív, Arne, Ann Gvøðny og Johannes**
**Martin, Lilly, Hákun, Katrin og Fríða**